Oyggjaleikir 2005
SHETLAND





**Sosialurin í Hetlandi**

Jens Kristian Vang,
myndamaður
jensk@sosialurin.fo

Eyðun Klakstein,
blaðmaður
eydun@sosialurin.fo

Jákup Mørk,
blaðmaður
jakup@sosialurin.fo




*Saman við Rúna Weihe verður Bárður B. Mikkelsen nú vónadni partur av noska oddastríðnum í flogbólti*

# Bárður fer til Tromsø

**Komandi kappingarár verða Rúni Weihe og Bárður B. Mikkelsen liðfelagar í Tromsø, har ætlanin er at endurvinna norskt gull í lands- og steypakapping**

FLOGBÓLTUR
*Jákup/Jens Kristian*

Eftir átta ár í danska Holte fer Bárður Bendix Mikkelsen nú at leita sær nýggjar avbjóðingar innan flogbóltin.

Sjálvur sigur Bárður, at hann hevur havt hug at royna nakað annað. Ikki minst, nú tilveran í Holte ikki hevur verið heilt so stuttlig seinastu tvey árini.

- Tað sigur seg sjálvt, at tað hevur verið eitt sindur møðsamt seinastu tíðina. Eg havi spælt í felagnum í átta ár, og millum annað vóru vit eitt skifti í hvørjari einastu finalu í tvey og eitt hálvt ár. Síðani hevur felagið skrúvað niður fyri ambitiónunum, og seinastu tvey árini hava vit ikki so mikið sum verið partur av endaspælinum, sigur Bárður.

## Vitjaði Rúna

Ikki heilt óvæntað, so er tað Rúni Weihe, sum hálvgum hevur formidlað sambandið millum Bárð og Tromsø. Eitt samband, sum kom í lag, eftir at Bárður var og vitjaði Rúna fyri stuttum.

- Tá tosaðu vit um møguleikan fyri, at eg kundi koma upp har at spæla. Nakað sum teir eisini høvdu áhuga í, tá teir bara hava ein fastan hevara, sum hartil hevur verið nógv skaddur. Teir ringdu so aftur til mín, og so havi eg kanna, hvussu hetta best kann gerast.

Men tað er væl ikki so, at tú bara skalt spæla flogbólt í Noreg?

- Nei. Men eg havi fingið orlov frá vanliga arbeiði mínum, samstundis sum eg havi fingið praktikkina í lesnaðinum, sum eg taki við síðuna av, lagda í Noreg. Allir hesir lutir komu upp á pláss beint undan oyggjaleikunum, og so er avtalan gjørd, sigur Bárður.

## Fara eftir gullinum

Og er tað strembanin eftir gulli og æru, sum Bárður leingist eftir, so tykist Tromsø at vera rætta staðið at koma til í so máta. Støðið er á leið tað sama, sum tað er í danska oddinum, og Bárður sjálvur ivast ikki í, hvar málið skal setast.

- Felagið vann jú greipuna fyri tveimum árum síðani, men í fjør taptu teir báðar finalurnar. Nakað av útskifting hevur verið á liðnum í summar, men málið er heilt greitt at fara eftir tí, sum vinnast kann.

Og í hesum royndunum verða tað altso tveir føroyingar, sum skulu hava týðandi leiklutir komandi kappingar. Hvørt talan so eisini kann gerast um norskt gull til Bárð, eftir at hann eisini hevur havt hendur á danska gullinum, er ein onnur søga. Ein søga, sum helst ikki verður svarað fyrr enn komandi vár.

## Aftast á 10.000 metrum



**Lerwick:** Rigmor N. Joensen satsar fyrst og fremst upp á hálva marathon-teinin á oyggjaleikunum. Men mánadagin tók hon eisini lut á 10.000 metra teininum.

Tað var tó ikki væntandi, at talan skuldi gerast um nakað heiðursmerki í hesum, men heldur um eina góða harða venjing at kalla. Og Rigmor var eisini nakað langt frá fremstu rennarunum.

Vinnarin í kappingini var av Hetlandi, og rann hon teinin í 38.19,74. Rogmor gjørdist nummar sjey av teimum sjey luttakarunum í tíðini 42.38,59
**-jm**

## Jóan Karl kom í finaluna

**Lerwick:** Jóan Karl Joensen er við á sínum fyrstu Oyggjaleikunum, og mánadagin rann hann fyri fyrstu ferð í Hetlandi.

Tað gekk rímiliga væl hjá honum, tí hann vann sær pláss í finaluni í 800 metra renningini.

Tvey innleiðandi umfør vóru, og Jóan Karl endaði sum nummar fýra í sínum umfari. Jóan Karl hevði áttandu bestu tíðina, men lítil munur er millum nógvar av tíðunum, og tí kann Jóan Karl møguliga gera ein vørr í finaluni, sum verður týskvøldið kl. 19.30.
ek